gult24 cyan24 magenta24 svart24



VINNUHÚSIÐ
House of Industry

# Samskipari hjá fiskivinnuni á landi

Av tí at starvsfólk okkara ferð í annað starv søkir Føroya Arbeiðsgevarafelag eftir einum ráðgeva til skrivstovuna í Vinnuhúsinum.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um málsviðgerð fyri Føroya Ráfiskakeyparafelag, ið røkir áhugamálini hjá føroysku fiskavirkjunum. Viðkomandi kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við stjóran í Vinnuhúsinum og við nevndina í Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Arbeiðið fevnir m.a. um:
- Kanningar av felags viðurskiftum hjá limunum
- Vinnuumboðan í sambandi við myndugleikakrøv
- Útflutningsviðurskifti
- Samband við útlendska fiskivinnu og seljarar
- Málsviðgerð / skrivarauppgávur fyri nevndina í Ráfiskakeyparafelagnum

Vit vænta, at tú:
- hevur hóskandi útbúgving og hollar arbeiðsroyndir, serliga innan fiskivinnuøkið
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- hevur góð samstarvsevnir
- dugir væl at samskifta á føroyskum, donskum og enskum.
- hevur hollan telduførleika á brúkarastøði (Windows Office forrit)

Vit kunnu lova tær eitt fjølbroytt, áhugavert og krevjandi starv.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn, merkt "Starv", eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 22. juni 2001.
Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til Jan Mortensen, tlf. 31 18 64.

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**
Vinnuhúsið
Postsmoga 179
110 Tórshavn

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá 13 vinnufeløgum og í løtuni starvast 6 fólk í umsitingini.
Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møgulig kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og politiskari ávirkan. Feløgini taka sær av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Deildarskrivari til Søgu- og samfelagsdeildina

Søkt verður eftir deildarskrivara til Søgu- og samfelagsdeildina á Fróðskaparsetrinum. Starvið er fyribils fyri 8 mánaðir, frá 1. august 2001 ella skjótast til ber.

Starvið er fjølbroytt, og fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði, serliga í sambandi við leiðsluna á Søgu- og samfelagsdeildini. Starvið setur krøv um góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt, og um góð evni at samskifta og samstarva við onnur. Góður kunnleiki til mál og til arbeiði við vanligum edv-forritum er ein fortreyt.

Skrivarin tekur sær av samskiftinum við Seturskrivstovuna, leysalærarar, studentar, húsavørðin og onnur. Eisini skal hann fyrireika fundir, skriva brøv, dagføra tøl til ymsar frágreiðingar, kanna kontoavrit, gera umsóknarskjøl, stýra journalini og so framvegis.

Starvið er eitt 3/4 starv og lønt í 2. lønarflokki sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Landsstýri.

Meir fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Søgu- og samfelagsdeildina.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. verður at senda Søgu- og samfelagsdeildini í seinasta lagi 27. juni 2001.

**Søgu- og samfelagsdeildin**
J. C. Svabos gøta 7
100 Tórshavn
Tlf. 317009

# Bókhandils-lærlingur

Vit leita eftir einum ágrýtnum og bjartskygdum lærlingi, sum dámar væl at lesa.

Tú skal hava **FHS, HH, students- ella HF-prógv.**

Lærutíðin er millum tvey og trý ár – tað velst um hvørja skúlagongd tú hevur.

Vit hava eitt spennandi arbeiðsumhvørvi við nýmótans tøkni og leggja dent á at veita góða tænastu.

Arbeiðið er fjølbroytt. Tú kemur m.a. at arbeiða við avgreiðslu, vørumóttøku, bíleggingum, lýsingum og sølframsýningum.

**Bókasølan**
SMS · Box 1247
110 Tórshavn
Tlf./fax 319575

# Fólk søkist

Søkt verður eftir barrfólki og duravørðum at byrja skjótast gjørligt.

Løn eftir avtalu.

Casablanca
Music Café & Restaurant

**Tlf. 319696 / 219696**

# Hús ella íbúð

ynskist í Suðurstreymoy til par við einum barni. Bæði hava fasta inntøku.

Skriva til:
**Sosialurin,**
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 13.06.

Suðuroyingar!
Útsetta skeiðið
til
Buss
Lastbil
Trailara
byrjar
á Drelnesi
mánakv. 18. juni kl. 20.00
(um nóg nógv tekna seg)
SP/F Koyrikortið
Tórshavnar Trafikkskúli
Stoffalág 82
Tel 318821 • 315298
Fartel 218777
www.team.fo

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg


ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

gult25 cyan25 magenta25 svart25





Trúlovingarringar
Vit hava ringarnar
Føroya størsta úrval av trúlovingarringum. Fleiri nýggj sløg av av tvílittum ringum og snyrilsringum.
**Ynskilisti í 3'aranum**
Set saman tín egna ynskilista, og vit halda skil á tínum gávum...
3arin
Tel 353535 - Fax 353536

# Íslendskur hestur

til sølu.

**Tlf. 447721**

# Fólk

Til pakkideildina hjá okkum søknast vit eftir fólki til fast arbeiði og fólki at avloysa í summarferiutíðini.

Áhugað biðjast vinarliga venda sær til okkara og tosa við sølustjóran Claus Mørkøre. Tlf. 31 46 50

**P/F Poul Michelsen**

# Norðoya Røktarheim
**700 Klaksvík**

Í sambandi við at sjúkrasystir fer í farloyvi, verður søkt eftir sjúkrasystir frá 01. september 2001 til 31. august 2002. Arbeiðstíðin er 16 tímar um vikuna í skiftandi vaktum. (lønarbrøkur 0,4).

Heimið hevur 2 deildir við 18 búplássum á hvørjari deild. Umsøkjarin skal rokna við at hava fakligu ábyrgd av báðum deildunum í arbeiðstíðini. Meira fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við leiðaran ella ein av deildarleiðarunum á telefon 457610, 457601 ella 457604.

Lønar- og setunartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og autorisatión, verður at senda til leiðaran fyri Norðoya Røktarheim, FO-700 Klaksvík.

Umsóknarfreist 3. juli 2001.

# Skrivstovustarv

Eitt hálvtíðarstarv sum skrivstovufólk á Landsmiðstøðini er leyst at seta til 1. september 2001. Arbeiðstíðin er seinnapart.

**Arbeiðið fevnir um**
- avgreiðslu av viðskiftafólki við skivuna og um telefon
- at læna út undirvísingarmiðlar
- røkt av Kunningarsavninum
- bókhald - ávísingar, rokningar v.m.
- ymiskt annað arbeiði á stovninum

**Vit vænta, at tú**
- hevur royndir í skrivstovuyrkinum
- hevur royndir at brúka vanligastu telduforritini
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt, ert røkin
- hevur góð samstarvsevni og hevur lætt við at samskifta við fólk

**Vit kunnu bjóða**
- eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv í einum stovni, sum hevur regluligt samskifti við flestu skúlar og lærarar í landinum, og sum hevur tætt samstarv við fyrisitingina í Mentamálastýrinum.
- menningarmøguleikar innan ávís øki innan skrivstovuarbeiði.

Talan er um 1/2 starv. Starvið verður lønt sambært sáttmálanum ímillum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í bólki II.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petur Ova Petersen, stjóra á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir v.m. skulu vera Landsmiðstøðini í hendi í seinasta lagi mánadagin 2. juli 2001.

**Landsmiðstøðin**
Hoyvíksvegi 72 * Postrúm 3084
FO-110 Tórshavn

*Landsmiðstøðin er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, hevur saman við MMS eina lærugreinráðgevaskipan, skipar fyri fak- og inspiratiónsskeiðum fyri lærarum, skúlastýrislimum og øðrum, ið varða av skúlanum. Á Landsmiðstøðini er miðlaverkstaður.*
*Á Landsmiðstøðini starvast, umframt stjóran, 3 skrivstovufólk og 9 lærugreinaráðgevar – tilsamans umleið 7 1/2 fulltíðarstarv.*

Søkt verður eftir:

# ófulltiknum dekkarum

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála við Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Fyri størvini er galdandi, at fyrstu 3 mánaðirnir eru royndartíð.

Umsókn við prógvum og viðmælum skulu sendast til Fiskiveiðieftirlitið/Vaktar- og Bjargingartænastuna, Postboks 347, 110 Tórshavn, í seinasta lagi hósdagin 21. juni 2001.

**Fiskiveiðieftirlitið/Vaktar- og Bjargingartænastan**
*tann 11. juni 2001*

STARV
sosialurin

Sosialurin

# Fólk søkist
## til Tíðindablaðið Sosialin, marknaðardeildin

Vit sóknast eftir einum fólki at taka sær av dagliga arbeiðinum við sølu av lýsingum og øðrum fyrifallandi uppgávum.
Herundir er ein uppgáva at verða við til at menna og reka Internet Sosialin.

Tú:
- Ert ágrýtin
- Dugir væl at tosa í telefon
- Hevur lætt at tosa við fólk
- Hevur áhuga fyri telduarbeiði
- Ert før/ur fyri at arbeiða undir tíðartrýsti
- Hevur hugflog og dugir at festa tað á pappír
- Dugir væl føroyskt
- Kanst byrja skjótast gjørligt

Vit kunnu bjóða:
- eitt spennandi og mennandi starv, har tú gerst partur av eini vælvirkandi marknaðardeild
- Samskifti innan- og uttanlands við viðskiftafólk okkara
- Áhugaverdar og fjølbroyttar uppgávur

Umsóknarfreistin er 25. juni 2001.
Løn samb. avtalu.
Umsóknin skal saman við viðkomandi skjølum sendast til:

Sosialurin
P.O. Box 76
110 Tórshavn
Att.: Marjun Dalsgaard

Tú ert vælkomin at ringja tel. 311820 at hoyra meira um starvið.
Spyr eftir Marjun ella send ein e-mail til:
marjun@sosialurin.fo

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Her starvast í dag uml. 25 fólk.

SMS søkir eftir

# húsi í Tórshavn

til tvey vaksin og eitt barn.
Húsini mugu verða klár at flyta inn í innan 1. august 2001.

Áhugaði verða vinarliga biðin um at ringja til tel. 22 13 99.

SMS

P/F SMS POSTBOKS 1059 FO-110 TÓRSHAVN TLF. 313041 FAX 317434